LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Áki Bertholdsen

# SKAL STRIPP BANNAST VIÐ LÓG?



– *Striptease er als ikki so meinaleyst, sum tað kann tykjast, sigur løgtingsmaðurin Jenis av Rana, sum nú fyrireikar uppskot um forboð ímóti strippi í Føroyum*

**STRIPTEASE ER EIN GLÍÐIBREYT, HELDUR LØGTINGSMAÐUR, SUM ÆTLAR AT LEGGJA UPPSKOT FYRI LØGTINGIÐ UM AT BANNA STRIPTEASE Í FØROYUM VIÐ LÓG**



MYND: JENS KRISTIAN VANG

Seinastu vikurnar hevur striptease verið meira sjónligt í Føroyum, enn tað mangan hevur verið. Høvuðsorsøkin til tað er, at Sjónvarpið hevur sent sending um føroyskan strippara í Danmark. Eisini hava aðrir miðlar havt greinar um stripparan.

Men eingin skal hava gleði av striptease í Føroyum, tí tað eru veikar kvinnur, sum verða útnyttaðar til hetta. Tað heldur í øllum førum Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum.

Hann ætlar sær at leggja uppskot fyri løgtingið um, at stripptease skal bannast við lóg í Føroyum.

Jenis av Rana sigur, at striptease er bannað við lóg í Íslandi og tað er haðani, at hann hevur fingið hugskotið um, hvussu eitt slíkt uppskot kann verða lagt til rættis og orðað fyri at vinna fram í politisku skipanini í Føroyum eisini.

### Veikar kvinnur

Jenis av Rana sigur, at royndirnar úr Íslandi vísa, at striptease er ein glíðibreyt, sum førir til skøkjulevnað og kvinnuhandil.

– Striptease er als ikki so meinaleyst, sum tað kann tykjast. Íslendingar siga, at har byrjaði tað so líðandi við, at skipað varð fyri striptease-tiltøkum ymsastaðni. Men hetta vant upp á seg og áðrenn nakar varnaðist, høvdu íslendingar stórar trupulleikar av skøkjulevnaði, sigur hann.

Ein ráðstevna í Norðurlandahúsinum fyri nøkrum árum síðani um kvinnuhandil, staðfesti somuleiðis, at nógv tær flestu kvinnurnar, sum enda í striptease og skøkjulevnaði, eru kvinnur, sum eru misbrúktar. Tað var eisini upplýst, at 90% av teimum vórðu longu misbrúktar, tá ið tær vórðu smágentur.

Jenis av Rana heldur, at tað er neyðugt, at politiska skipanin tekur um rótina á trupulleikanum og bannar striptease, áðrenn tað sleppur at vinda upp á seg, so at vit, áðrenn vit varnast tað, standa við somu trupulleikar av skøkjulevnaði, sum íslendingar hava.

## Púra samd við Jenis

Elin Reinert Planck
**LEIÐARI Í KVINNUHÚSINUM**





– Eg eri púra samd við Jenis av Rana í hesum máli, og eg taki fult undir við, at striptease verður bannað við lóg í Føroyum. Tað er væl kent, at nógvar kvinnur, sum onkusvegna selja seg sjálvar, hava verið fyri umsorganarsviki og misbrúki, tá ið tær vóru smágentur og tí eru í eini serligari støðu.

Striptease kann gerast ein glíðibreyt, sum førir til skøkjulevnað og kvinnuhandil. Tað var akkurát tað, sum hendir í Íslandi. Har byrjaði tað við, at stripparar vórðu fingnir til Íslands av og á at framføra á einstøkum tiltøkum. Men tað vant upp á seg tað endaði við at tað vóru sjey skøkjuhús í Íslandi, har tey fimm vóru í Reykjavík og hini bæði í øðrum býum.

Tað er eisini staðfest, at handil við kvinnum fór fram í Íslandi. Talan var um fremmandar kvinnur, sum vórðu lokkaðar til Íslands undir skeivum fortreytum, men komnar til Íslands, var passið mangan tikin frá teimum, og tær vórðu tvingaðar at arbeiða í skjøkjuhúsum. Tað vóru heldur ikki tær, sum fingu vinningin av hesum, men tey, sum skipaðu fyri.

Tí eru allar orsøkir til at taka hetta málið í fullum álvara og at banna striptease, áðrenn tað sleppur at vinda upp á seg.